# FM í talvi fyri ung

**Talvsamband Føroya skipar í vetur fyri Føroyameistarakapping fyri børn- og ung einstaklingar í talvi**

TALV
*tíðindaskriv*

Kappingin verður skipað í 5 ymiskum aldursbólkum, og er samstundis úttøkukapping til Norðurlandameistaraheitið 2005.

Kappingin um FM-heitið verður í somu aldursbólkum sum til NM-kappingina:

**A - bólkur:**
Telvarar føddir 1985-87
**B - bólkur:**
Telvarar føddir 1988-89
**C - bólkur:**
Telvarar føddir 1990-91
**D - bólkur:**
Telvarar føddir 1992-93 og
**E - bólkur:**
Telvarar føddir 1994 og seinni.

Skipað verður fyri 3 kappingum, har tvær tær fyrstu eru úttøkukappingar til endaligu finaluna:

1. Fyrsta kappingin verður 6. november 2004 í Vágunum (fyriskipari MT/ST). Telvað verða 8 umfør, har hvør telvari hevur 10. min. í part til hvørt talvið. Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjum aldursbólki. Byrjað verður kl. 12.

2. Onnur kappingin verður 20. november 2004 í Norðskála/Oyri, (fyriskipari Rókur). Telvað verða 8 umfør, har hvør telvari hevur 10. min. til hvørt talvið. Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í hvørjum aldursbólki. Byrjað verður kl. 12.

3. Triðja kappingin (finalan) verður 27. november 2004 í Tórshavn (fyriskipari TSF). Telvað verða 7 umfør, har allir møta øllum. Hvør telvari hevur 30 min. í part til hvørt talvið. Í finaluni luttaka teir 8 telvararnir, sum í tveimum teimum fyrstu kappingunum hava staðið seg best. Byrjað verður kl. 10.

Í finaluni verður nr. 1 í hvørjum aldursbólki Føroyameistari, nr. 2 gerst nr. 2, o.s.fr. Steyp verða latin til nr. 1, 2 og 3 í finaluni.

Umframt føroyameistaraheitið, kvalifisera nr. 1 og 2 í hvørjum aldursbólki seg til árligu NM-kappingina fyri einstaklingar, sum næstu ferð verður í Oslo í Noregi - í februar mánað 2005. Tá kappast føroysku umboðini ímóti hinum norðurlondunum um NM heitið.

Sì annars á heimasíðu TSF´s: www.faroechess.com.



*Talvsambandið fer aftur í vetur at skipa fyri FM-kapping fyri yngru telvararnar*




# Dráttur mundi skapt sensatiónina

**Tað var um reppið, at Mjølnir snávaði á heimavølli, tá Dráttur vitjaði sunnudagin**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tað var um reppið, at Dráttur tók øll á bóli, men at enda máttu tær ásanna, at tær skuldu fara stigaleysar úr Klaksvík*

Tey flestu mundu havt roknað við, at skuldi nakar spenningur vera í KÍ-høllini sunnudagin, so mátti hesin vera í mansdystinum, tá Fleyr vitjaði. Fáur mundi í øllum førum rokna við, at talan fór at gerast um gysara, tá Dráttur av Giljanesi vitjaði kvinnuliðið hjá Mjølni.

Fyrstu tvey setttini tóktist heldur ikki, sum um tað fór at bila hjá Mjølni, men so kom Dráttur brádliga við í spælið. Tær vunnu triðja settið, tá heimaliðið helst helt sigurin vera vísan, og so hendi tað, sum so ofta hendir í slíkum støðum. Mjølnir megnaði ikki veruliga at koma ígongd aftur í dystinum, og tá Dráttur so eisini tók sær av fjórða settinum, skuldi javnbrótari til.

Her eydnaðist tó Mjølni at toga sær 15-11 sigur heim, soleiðis at stigini ikki fóru nakran veg, men Dráttur fekk í øllum førum givið eina kraftiga ávaring.

Sigurin lyfti Mjølnir upp á eitt einsamalt oddapláss við seks stigum fyri tríggjar dystin. Dysturin millum TB og ÍF, sum skuldi verða leiktur sunnudagin, varð nevnliga útsettur.

Leygardagin var tó dystur í Sørvági millum SÍ og KÍF. Tað varð sagt undan hesum, at hetta kanska var besta høvið hjá SÍ at fáa stig, men hesum vóru tær ongantíð nær við. KÍF vann ein tryggan 3-0 sigur, só fyribils er nýggja liðið í deildini púrasta avbyrgt í botninum.

**Úrslit, meistaradeild kvinnur**
SÍ-KÍF 0-3 (17-25, 15-25, 22-25)
Mjølnir-Dráttur 3-2 (25-13, 25-19, 20-25, 21-25, 15-11)
ÍF-TB, útsettur

# Mjølnir ov sterkir

**Tað var lítið at rafla um, tá oddadysturin var á skránni í Klaksvík um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Fleyr royndi allan dystin at stríðast, men Mjølnir var tað lítla pettið hvassari leygardagin*

*Mynd: SáH*

Tað vóru mong, sum við spenningi høvdu sæð fram til mansdystin í Klaksvík millum Mjølnir og Fleyr.

Hetta skuldi ordiliga vera sum í gomlum døgum, har teir báðir risarnir hvørt ár stríddust um FM-heitið, og har mest sum hvør einasti bólturin var eitt úrslit av spennandi tvídystum millum tey bæði liðini.

Soleiðis gjørdist støðan tó ongantíð sunnudagin. Mjølnir vóru snøgt sagt alt ov sterkir og royndir hjá Fleyr, sum ikki fekk mutað stórvegis ímóti tryggum 3-0 sigri til heimaliðið. var eina løtu væl við í dystinum, men tó at teir royndu at stríðast allan dystin á tamb, so var Mjølnir tað lítla pettið hvassari. Soleiðis eru Mjølnir nú einsamalt oddalið í deildini, og í løtuni er ilt at ímynda sær, hvør skal nerta hesa støðuna.

Um nakar, so skal tað kanska verða SÍ, sum í fyrsta umfarinum tapti 3-1 í Klaksvík. Teir høvdu um vikuskiftið vitjan av Fram, og tað nervaði ikki sørvingarnar stórvegis. Fram tykist í løtuni eisini vera klárt tað veikasta liðið í deildini, og tað er einki at ivast í, at soleiðis sum kappingin sær út í ár, so verður teirra leiklutur ein roynd at vinna sær okkurt settið av og á.

**Úrslit, Meistaradeild menn**
SÍ-Fram 3-0 (25-22, 25-11, 25-18)
Mjølnir-Fleyr 3-0 (25-18, 25-21, 25-21)

# Taptu seinasta dystin

Føroyska talvlandsliðið tapti 3-1 fyri Íslandi í seinasta umfarinum av talv-OL. 3-1 var nú eingi katastrofa fyri føroyska liðið, tí Ísland varð styrkismett nakað væl omanfyri okkara.

Hans Kristian Simonsen og John Rødgaard fingu javnleikir í sínum talvum. Martin Poulsen og Olaf Berg taptu síni talv.

Úrslitið ber við sær, at føroyska liðið endaði á einum 75. plássi, sum er 12 stig omanfyri styrkismetingina við 27,5 stigum. Danmark gjørdist besta norðanlandi. Teir vunnu 4-0 í seinasta umfarinum, og endaðu soleiðis við 31,5 stigum. Tað rakk til eitt 28. pláss.

Í blaðnum í morgin verður tikið samanum føroyska avrikið á talv-OL.

**-jm**



StÍF-VB 23-34 (13-19):

# VB heldur trýstinum

**Við greiðum sigri á StÍF sýndi VB enn einaferð, at tær ikki vilja lata Stjørnuna sleppa nakran veg**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir hvøkkin, sum VB fekk seinast vikuskifti á Giljanesi, skuldi liðið sunnudagin prógvað, at tær meina tað í álvara, tá tær aftur í ár siga seg medda eftir toppinum.

Og tað eydnaðist eisini at sannføra bæði StÍF og vágbingar um, at soleiðis fer tað aftur at verða. Hóast liðið var nakað skert, nú Rannvá Augustinussen hevði leikbann, so var sjáldan nakar veruligur slingur í valsinum. Tó at tað ikki gekk so lætt at renna frá StÍF, so var tað alla tíðina VB, sum hevði munin í fyrra hálvleiki.

Spakuliga vaks leiðslan, og í seinna hálvleiki kom so av álvara ferð á. Verjan fekst veruliga at rigga eina løtu, og tá Daiva Toumaite samstundis hevði hitað skotarmin væl upp til brotskøst og virðiliga upp, fór ein bóltur fyri og annar eftir sendandi inn í StÍF-meskarnar.

Sjey mál á rað beindu allan spenning í dystinum burtur, og so kundu vágbingar aftur staðfesta, at liðið hjá teimum aftur í ár ætlar sær at spæla við frammi í oddinum.

Enn er munurin upp til Stjørnuna tvey stig, men liðini hava framvegis ein sínamillum dyst eftir í grundspælinum, og í endaspælinum fara stigini av álvara at telja. So tað verður helst aftur í ár talan um eina spennandi kapping millum tey fremstu.

## FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-VB 23-34 (13-19)**
**Málskjúttar**
**StÍF:** Poula D. Olsen 6, Sunfríð B. Jacobsen 5(4), Anna B. Danielsen 5, Rebekka Justinussen 3, Malan Petersen 2, Paula Høgnesen 2
**VB:** Daiva Toumaite 11(9), Sólrun Krosslá 4, Margreth Augustinussen 4, Aukse Vysniaskaite 4, Arnleyð Hjelm 4, Laila Jespersen 4, Christina Holm 2, Jóna Thorsteinsson 1
**Brotskøst:** StÍF 6, VB 9
**Útvísingar:** StÍF 5, VB 2
**Dómarar:** Hannis Wardum & Uni Wardum

# FCK framvegis fult móti FCN

**Eftir rættuliga trilvandi fyrsta triðing av kappingini, tykist føroyska útisetafelagið at hava fótað sær, og nú eru teir á fjórða plássinum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongur alt annað enn skjótt hjá Toda Jónsson at koma fyri seg. Føroyska íslettið í bestu donsku deildini er einki, og sambært heimasíðuni hjá Toda, so røkist einki fyri, at hann fer at verða tøkur aftur.

Hjá FCK er tað farið at hilnast eitt sindur betri. Í vikuskiftinum var annað umfarið í øðrum triðinginum á skránni. FCK var í Farum, og tað eydnaðist teimum at fáa fult. Tað iðrar FCN venjaran, Christian Andersen, ógvuliga nógv. Hann bíðar framvegis eftir at fáa stig frá felagnum, sum hann er so illur inná, tí teir fyri nøkrum árum síðani góvu honum sekkin, tá ið hann bara hevði verið har í knappar tveir mánaðir.

Hesa ferð var um reppið, at tað eydnaðist FCN at vinna. Tá ið seks minuttir vóru eftir, varð FCK álopsmaðurin, Peter Møller, vístur av vøllinum, tí hann hevði havt ælbogan ov høgt, tá ið hann brast saman við mótstøðumanni. Tá var støðan 2-1 til FCK. Eina lítla løtu seinni javnaði FCN, og so legði heimaliðið í Farum nógv fyri í royndini at fáa øll stigini. Men tað eydnaðist so dyggiliga. Í staðin var tað Zuma, sum í 93. minutti skoraði sigursmálið fyri FCK. FCN er næstniðast og harvið á niðurflytingarplássi.

Brøndby er framvegis nógv fremst. Hesa ferð vóru teir í Silkeborg. Á heimaliðnum vóru teir sera illa nøgdir við, at dómarin ikki í minst einum og kanska tveimum førum bríkslaði fyri brotssparki til teir. Brøndby vann 1-0, og Michael Laudrup heldur, at liðið nú spælir betri og við størri sjálvsáliti, enn tað nakrantíð hevur gjørt, meðan hann hevur verið venjari.

FCK er tíggju stig aftanfyri Brøndby. Men Michael Laudrup sigur, at hann hugsar fyrst og fremst um FCK sum kappingarneyta og avbjóðara í stríðnum um meistaraskapin, og tað heldur hann einki forgjørt vera í.

## Ætla at fella seg sjálvar

Viborg er framvegis næstfremst. Hesa ferð høvdu teir vitjan av OB, sum legði ógvuliga bragdliga fyri í summar, men sum tað hevur verið soltið hjá nógvu tær síðstu ferðirnar. Viborg vann 1-0, og hetta var sætta ferðin á rað, at teir fóru av vøllinum uttan at hava tapt. Nú eru teir í Viborg spentir uppá, um tað skal eydnast teimum at røkka sínum egna meti. Í 2000 spældu teir átta ferðir á rað uttan at tapa.

Hjá bronsuvinnarunum í Esbjerg hevur tað ikki gingið meiri enn passaligt higartil í ár. Eftir vitjanina í Herfølge eru teir framvegis á 8. plássinum. Úrslitið var 1-1, og Herfølge er á 9. plássinum. Esbjerg hevði fleiri góðar málmøguleikar, sum teir misnýttu. Í Esbjerg eru teir ikki fegnir um støðuna. Í Herfølge siga teir seg vera í tí støðuni, sum teir høvdu roknað við. Liðið er nýtt, og tað skal meiri til at samanspæla tað.

Heldur ikki hjá AaB hevur tað hilnast nakað serligt higartil. Hesaferð vóru útlit fyri fullari úrtøku, tí AaB hevði vitjan av botnliðnum Randers. Heimaliðið hevði eina rúgvu av møguleikum, men tað eydnaðist ikki at fáa meiri enn tað eina málið. Tað fingu teir, tá ið eitt korter var eftir. Í fimm minuttir tóktist tað sum um, at hetta málið skuldi vera nóg mikið til trý stig, men so javnaði Randers til 1-1, sum gjørdist endaliga úrslitið.

Í Århus hevði AGF frammanfyri 8.925 áskoðarum vitjan av FCM, og talan var um sera undirhaldandi uppgerð. Heimaliðið hevði nógvar møguleikar, og teir løgdu seg á odda 1-0, men so fekk FCM tvey mál, og eina løtu sá tað út til, at teir skuldu fara aftur til Herning við øllum. Men AGF var sera ágangandi, og teimum eydnaðist at javna til 2-2.




## Danska superligan

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 13 | 9 - 3 - 1 | 21 | 7 | 14 | 30 |
| 2 Viborg | 13 | 7 - 3 - 3 | 15 | 10 | 5 | 24 |
| 3 FCM | 13 | 6 - 3 - 4 | 19 | 18 | 1 | 21 |
| 4 FCK (M) | 13 | 5 - 5 - 3 | 21 | 21 | 0 | 20 |
| 5 OB | 13 | 6 - 1 - 6 | 24 | 18 | 6 | 19 |
| 6 AGF | 13 | 5 - 4 - 4 | 22 | 18 | 4 | 19 |
| 7 AaB | 13 | 5 - 3 - 5 | 21 | 15 | 6 | 18 |
| 8 Esbjerg | 13 | 5 - 3 - 5 | 26 | 21 | 5 | 18 |
| 9 Herfølge | 13 | 4 - 2 - 7 | 14 | 27 | -13 | 14 |
| 10 Silkeborg | 13 | 4 - 1 - 8 | 21 | 25 | -4 | 13 |
| 11 FC Nordsj. | 13 | 3 - 3 - 7 | 15 | 23 | -8 | 12 |
| 12 Randers FC | 13 | 2 - 3 - 8 | 11 | 27 | -16 | 9 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

## Danska 1. deild

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 13 | 9 - 2 - 2 | 27 | 11 | 16 | 29 |
| 2 Frem | 13 | 8 - 3 - 2 | 30 | 9 | 21 | 27 |
| 3 Sønderjyske E | 13 | 8 - 2 - 3 | 33 | 16 | 17 | 26 |
| 4 Vejle | 13 | 8 - 0 - 5 | 35 | 27 | 8 | 24 |
| 5 Køge | 13 | 6 - 5 - 2 | 30 | 17 | 13 | 23 |
| 6 HIK | 13 | 7 - 2 - 4 | 23 | 19 | 4 | 23 |
| 7 Fremad Am. | 13 | 6 - 4 - 3 | 25 | 14 | 11 | 22 |
| 8 Skjold | 13 | 6 - 2 - 5 | 20 | 23 | -3 | 20 |
| 9 Fredericia | 13 | 5 - 4 - 4 | 20 | 15 | 5 | 19 |
| 10 AB | 13 | 5 - 3 - 5 | 23 | 23 | 0 | 18 |
| 11 NFA | 13 | 4 - 3 - 6 | 28 | 29 | -1 | 15 |
| 12 Brønshøj | 13 | 3 - 3 - 7 | 20 | 29 | -9 | 12 |
| 13 B 93 | 13 | 2 - 5 - 6 | 23 | 34 | -11 | 11 |
| 14 Næstved | 13 | 2 - 2 - 9 | 12 | 31 | -19 | 8 |
| 15 Ølstykke | 13 | 2 - 2 - 9 | 18 | 41 | -23 | 8 |
| 16 Dalum | 13 | 2 - 0 - 11 | 19 | 48 | -29 | 6 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Jann Ingi Petersen, Andrew av Fløtum, Hjalgrím Elttør (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

## Danska 2. deild

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brabrand | 12 | 9 - 2 - 1 | 34 | 14 | 20 | 29 |
| 2 Jetsmark | 13 | 8 - 2 - 3 | 36 | 23 | 13 | 26 |
| 3 Holbæk | 14 | 8 - 2 - 4 | 27 | 17 | 10 | 26 |
| 4 Kolding FC | 13 | 8 - 0 - 5 | 25 | 20 | 5 | 24 |
| 5 Glostrup | 13 | 7 - 2 - 4 | 29 | 21 | 8 | 23 |
| 6 Lyngby | 13 | 7 - 1 - 5 | 30 | 17 | 13 | 22 |
| 7 Slagelse | 13 | 6 - 4 - 3 | 23 | 17 | 6 | 22 |
| 8 Næsby | 13 | 6 - 3 - 4 | 24 | 17 | 7 | 21 |
| 9 Roskilde | 13 | 6 - 0 - 7 | 15 | 22 | -7 | 18 |
| 10 B 1909 | 14 | 4 - 4 - 6 | 12 | 20 | -8 | 16 |
| 11 Aarhus Fr. | 12 | 4 - 3 - 5 | 22 | 19 | 3 | 15 |
| 12 Hjørring | 13 | 3 - 4 - 6 | 16 | 22 | -6 | 13 |
| 13 B 1913 | 13 | 3 - 3 - 7 | 18 | 27 | -9 | 12 |
| 14 Holstebro | 13 | 3 - 2 - 8 | 16 | 26 | -10 | 11 |
| 15 Kalundborg | 13 | 2 - 3 - 8 | 21 | 35 | -14 | 9 |
| 16 Værløse | 13 | 2 - 1 - 10 | 12 | 43 | -31 | 7 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)